## DAGSINS MEINING

# Út í óvissuna

Tað kann gerast ein tung og torfør uppgáva hjá komandi landsstýri at skula taka um endan. Hetta hevur verið eitt lætt skeið fyri samgonguna, tí fiskaprísirnir hava verið so góðir og hevur eisini verið nóg mikið til av fiski. Samanumtikið hevur vinnan havt tað gott. Men nú hómast svørt skíggj á luftini. Sumt bendir á, at samfelagið er við at ganga ringum tíðum á møti. Alingin hevur verið fyri bakkasti. Sjúka hevur gjørt um seg, og prísurin hevur verið í botni. Rækjuflotin hevur tað alt annað enn gott. Svartkjafturin, sum eigur lívið í fleiri vinnugreinum her á landi, er í løtuni við eitt álvarsligt vegamót. Vandi er fyri, at stovnurin verður niðurfiskaður, nú norðmenn hava saboterað allar royndir at koma til eina semju um at avmarka veiðuna. Síðani eru tað prísirnir á fiski sum heild, ið ganga tann skeiva vegin. Við hoyra um minkandi eftirspurning eftir td. saltfiski.

Enn merkist henda skeiva gongdin ikki nógv. Men nógv peikar tann skeiva skeiva vegin. At samgongan hevur kutað 400 mill. kr. av blokkinum kann koma at vísa seg at hava verið tað reina hasard, tí um tað vil illa til hjá okkara høvuðsvinnu, eru 400 mill. kr. ikki smápengar.

Síðani er tað oljan. Føroyingar hava sett sítt álit til hesa nýggju vinnu, men kortini hevur tað alla tíðina verið víst á, at vit eiga at vera varin og ikki gera stórar íløgur í nakað, sum so stór óvissa er um enn. Tað er greitt, at tað slepst ikki undan einum ávísum bjartskygni, tá fleiri av heimsins stóru oljufeløgum vilja brúka nógvar pengar her. Oljan er jú funnin hinumegin markið og spurt verður tí, hví hon ikki eisini skal vera hesumegin.

Tað er greitt, at alt hetta kann koma at merkjast í samfelagnum sum frálíður. Risastórar íløgur verða gjørdar í samferðslu og annað. Spurningurin er um vit hava tikið munnin ov fullan – um vit hava gjørt hesar nógvu íløgur við vónini til framhaldandi góðar fiskaprísir og eini komandi oljuvinnu sum grundarlag.

Metingar okkara av óvissuni í komandi leiting koma helst at passa. Tað merkir, at vit skulu helst til at bíða í eitt til tvey ár, áðrenn munandi leiting verður aftur á landgrunninum. Eingin ivi er um, at komandi boring hjá Amerada Hess hinumegin markið í næstum, fer at verða avgerandi fyri, hvussu verður við áhuganum at gera íløgur í okkara øki næstu árini. Tað kann ganga báðar vegir. Funnin er olja og gass, men enn veit eingin at siga, um hetta er í nóg stórum nøgdum og um allar fotreytirnar fyri at kunna fara undir framleiðslu, eru til steðar.

Um boringin hjá Hess verður eitt vónbrot, er møguleiki fyri, at leitivirksemið fer at verða avmarkað komandi árini. Tað merkir ikki, at eingin áhugi verður fyri økinum. Feløgini fara at brúka meiri tíð og orku til seismiskar kanningar. Tað ljóðar, at heimsins størsti oljuframleiðari, Saudi Arabia er í ferð við at liberalisera oljuvinnuna soleiðis at útlendsk oljufeløg fara at brúka størri part av sínum leitipengum har heldur enn í dýrari og truplari leitiøkjum sum eitt nú á Atlantsmótinum. Vit kunnu so bara vóna, at Hessboringin í næstum fer at eydnast so mikið væl, at hon fer at fasthalda áhugan hjá oljufeløgunum fyri okkara øki. Men óvissan er stór og tað eiga okkara myndugleikar eisini at hugsa um, nú tosað verður um nýggjar yvirtøkur.

Øll henda óvissan eigur at fáa okkara myndugleikar at vísa varsemi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# SURVIVAL OF THE FATTEST - føroyskur mentanarpolitikkur

**Jógvan Isaksen**



Einar Kárason fortaldi einaferð um ein íslending, sum ongantíð hevði verið burturi og ferðast og heldur ikki hevði tann stóra hugin. Vinmenninir gingu á hann og søgdu, at hann mátti út at líta seg íkring, hvussu alt var annarleiðis enn í Íslandi. At enda orkaði maðurin ikki at hoyra teirra grenj longur, so hann gjørdi av at fara út at síggja stóru verð. Hann fór við Smyrli til Føroya. Eftir at hava steðgað í einar fjúrtan dagar fór hann aftur til Íslands og bar vinmonnunum tey tíðindir, at hann ikki helt, at útheimurin var stórt øðrvísi enn Ísland.

Rætt er, at føroyingar og íslendingar í mangar mátar eru líkir, men á einum øki víkja við fullkomiliga frá hvørjum øðrum. Íslendingar hava frá fyrndartíð havt virðing fyri bókmentum og rithøvundum, og hetta merkist aftur í samfelagnum í dag. Í Føroyum hevur tað øvut verið tosað um at lesa seg býttan, og tann tvørrandi virðingin fyri bókmentum sæst aftur í føroyskum mentanarpolitikki. Hann finst nevniliga at kalla ikki, er í flestu førum bara eitt eiti. Løgtingið samtykkir nú og tá ymiskt á hendan bógvin, illanstíð øðrvísi, men "gloyma" oftani at játta pening til samtyktirnar. Ein mentanarlig líkasæla valdar.

Einaferð hevði Mentunargrunnur Føroya Løgtings 1,8 milliónir at býta út til útgávur og mentanarlig tiltøk. So broytti grunnurin navn til Mentunargrunn Landsins, og nú hevur hann 900 túsund krónur til somu endamál. Men hóast stuðulin er skorin niður í eina helvt, metir formaðurin í grunninum ikki, "at tað fer at ganga út yvir nakran" (Rói Patursson í Sosialinum 22/2-02). Jú, tað kann eg lova tær fyri, at tað fer at ganga út yvir nakran. Tað hevur tað longu gjørt.

Í sjónvarpinum segði sami formaður, at forløgini mugu royna at virka undir handilsligum treytum. Tað verður torført, at kalla ógjørligt. Akkurát tí tann føroyski marknaðurin er so avmarkaður, ber tað ikki til at lata eina fullkomna liberalismu ráða á hesum øki.

Í teimum flestu føroysku forløgunum er alt arbeiðið sjálvboðið, tey einastu, sum fáa pengar aftur fyri, eru prentsmiðjurnar og bókahandlarnir. Verður nú tráhildið um, at bókaútgávan næstan ikki skal stuðlast, verður tað ikki til survival of the fittest, men survival of the fattest. Tey forløg, sum standa á fíggjarlógini - Føroya Skúlabókagrunnur og Bókadeild Føroya Lærarafelags - fara at yvirliva, meðan tey flestu av hinum fara at hvørva. Vit fara aftur í tíðina, tá ið Egið Forlag var nógv størsta forlag í landinum.

Millum tey forløg, sum nú gevast ella akkurát hóra undan eru Sprotin, Fannir, Stiðin og Mentunargrunnur Studentafelagsins. Hyggja vit at útgávunum hjá hesum forløgum tey seinnu árini, so hava tey givið tað mesta av føroyskum fagurbókmentum út, somuleiðis klassiskar týðingar og yrkisbókmentir á høgum støði. Nógv av hesum verður komandi ikki givið út. Samprentsbøkurnar og ymiskt siðsøguligt fer at halda fram, meðan fitt av føroyskum upprunatilfari verður dripið í egginum. Umsóknin verður ongantíð send til Mentunargrunn Landsins, tí tað er ikki somikið vert.

# Muran í landstýrinum

### Fáa vit ikki okkara ígjøgnum við góðum, so tvinga vit tað ígjøgnum við lóg

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Feskasta dømi, er uppskoti um broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting. Landsstýrismaðurin í lógarmálum mótmælir, at exitpoll kanning verður framd í valhølinum til Fólkatingsvalið, men fær ikki viðhald í sínum mótmæli.

Hetta vil landstýrismaðurin ikki finna seg í og ger ikki mætari enn at leggja eitt lógaruppskot fram, sum skal seta forboð fyri exitpoll kanningum.

At sjónveik og blind verða nevnd í uppskotinum er bert tí, at hesi hava verið eftirbátar sum ikki einaferð og fyri at fjala yvir, hvat veruliga liggur aftan fyri lógaruppskotið, nevniliga at seta forboð fyri exitpoll kanningum.

Hetta vísur øllum Føroya fólki, hvussu arbeitt verður í landstýrinum, fáa teir ikki sín vilja, ja so gera teir bert eina lóg, so at teir fáa sín vilja.

Hvat fólkið sigur er líkamikið.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Er Miðflokkurin ein útreiðsluflokkur??

**Bill Justinussen**



Eg havi hoyrt onkran sagt, at politikkurin hjá Miðflokkinum bara kostar landskassanum pengar. Hetta er ein fordómur, sum summi - helst í gáloysni - gera seg sek í. Eg skal við nøkrum dømum vísa á, at um Miðflokkurin fekk høvi til at fremja sín politikk, hevði landskassin kunnað spart nakrar hundrað milliónir árliga í rakstri.

**Heilsuverkið**
Ein stórur partur av allari sjúkraviðgerð og harvið av útreiðslunum hjá heilsuverkinum stavar frá ósunnum levnaði og skeivum hugburði til lívið sum heild. Orsakað av royking, rúsdrekkanýtslu, rúsevnamisnýtslu, ováti v.m. enda nógv menniskju sum sjúklingar. Sjúkurnar, sum stava frá hesi misnýtslu, eru sjálvgjørdar, og kunnu sostatt eisini fyribyrgjast, um alt samfelagið heilt frá tí einstaku familjuni inn í barnaansingarstovnarnar og síðani skúlaverkið saman tekur tøk, sum hava til endamáls at fáa fólk at liva eitt sunnari og betri lív. Ein rættur hugburður um hesi viðurskifti vildi spart heilsuverkinum fyri eitt trísiffrað milliónа tal av krónum samstundis sum trivnaður og størri útboð av arbeiðskraft hevði verið vinningurin á plusssíðuni. Politikkur Miðfloksins á hesum øki er ein intensivering av upplýsingarsíðuni saman við møguligum tvungnum skipanum, sum skulu venja hvørt barn í Føroyum at liva sunt og at halda seg burtur frá skaðiligum evnum sum nikotin og rúsandi evnum.

**Almannaverkið**
Hesin politikkur hevði samstundis minkað um trýstið á almannaverkið. Forsorgarklientellið hevði minkað munandi og talið av fólki á arbeiðsmarknaðinum hevði eykast. Við sjúku fylgir ofta forsorgartørvur og vánaligur trivnaður, og hevði ein sunnari hugburður til omanfyrinevndu viðurskifti kunnað spart almanna-verkinum fyri 10-tals milliónir.

**Rætturin til lív**
Tað kostar heilsuverkinum hvørt ár væl av peningi at fremja fosturtøkur. Hesin peningur kundi verið spardur, um Miðflokkurin fekk viðhald í sínum politikki. Um ongar fosturtøkur vóru framdar seinastu mongu árini, hevði tørvurin á innfluttari arbeiðsmegi verið tað minni og hevði hetta verið eitt stórt aktiv hjá føroyska samfelagnum.

**Miðspjaðing**
Miðspjaðing hevði minkað um trýstið á íbúðarmarknaðin í høvuðsstaðnum og hevði sostatt hildið húsaprísirnar á einum lægri støði. Hetta hevði spart landskassanum fyri nógvar milliónir í rentustuðli. Veruleikin er, at eini hús í Havn, sum kosta 1,5 mill kr. kosta um 900 túsund kr. á bygd. Sostatt kostar tað landskassanum nógvar milliónir eyka um árið í rentustuðli, at fólk velja at keypa hús í Havn heldur enn á bygd. Her hevði politikkur Miðfloksins eisini verið ein sparing fyri landskassan.

**Einkarrættirnir**
Eitt av aðalmálum Miðfloksins síðani stovnan hevur verið avtøka av einkarrættum. At telefonvirksemi, tryggingarvirksemi, flogleiðirnar v.m. er farið á fleiri hendur hevur spart einstaka føroyinginum 10-tals milliónir seinastu árini. Hóast hetta ikki er sparing í landskassans útreiðslum, so hava tú og eg merkt positivu avleiðingarnar av hesum politikki.

**Ergo..**
So, góði lesari, sum sæst er Miðflokkurin ikki ein útreiðslukrevjandi flokkur, men kundi við sínum politikki verið við til at spart almenna húsarhaldinum fyri rúgvuvís av óneyðugum útreiðslum bæði í heilsu- og almannaverkinum. Mong onnur dømi kunnu nevnast, men tað kunnu vit goyma til onkra aðra ferð.

# Barnagarð til Landssjúkrahúsið og aftur í 60`ini

**Katrin Dahl Jakobsen**
*løgtingskvinna fyri Javnaðarflokkin*



”Barnagarð til landssjúkrahúsið – koma teir við hasum nú”, segði mín skjótt 88 ára gamla mamma, ein dagin hon sat og las bløðini. ”Betri skuldu teir havt lurtað eftir okkum, tá vit fyrst í 60`unum stríddust fyri tí! Tað mundi vera eitt gott hugskot, sum enn kann brúkast næstan hálva øld seinni”. Vit, tað var nevndin í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Hesar skilakonur við Andreu Árting á odda sendu Tórshavnar Býráð bræv fyri 40 árum síðan og greiddu frá frálíka hugskoti teirra at byggja felags barnagarð til Bacalao og ”Hospitalið”. Tær hildu tað vera rímiligt, at tvey tey størstu arbeiðsplássini í Havn tóku seg saman um hetta. Leiðsluni á sjúkrahúsinum dámdi væl hugskotið og í sama viðfangi syrgdu tær fyri, at tær á hospitalinum, sum ikki vóru organiseraðar, sum tær plagdu at siga, blivu tað.

**Tryggja seg sjálvar**
Drívmegin hjá hesum konunum, sum allar arbeiddu á Bacalao, uttan sjálv forkvinnan, var at tryggja arbeiðsplássinum fólk og tryggar umstøður fyri børnini, meðan mammurnar vóru í fiski. Hetta við at børnini lógu fram eftir rommum dagin langan á Bacalaokaiini og fiskaðu ternumurtar ella hingu uppi í fiskakørunum og pilkaðu royggj, bar ikki til í longdini! Virksemið var øgiligt, og ofta máttu tær arbeiða yvir. Minst 150 fólk arbeiddu á Bacalao, og alla tíðina stóð á at fáa frá hondini. Hugburðurin var bæði at verja seg sjálvar og arbeiðsplássið, sum tær vóru góðar við, og brúk var fyri báðum. Páparnir vóru ikki ordiliga til tá.

**Klassamunur**
Við brævinum til kommununa hugsaðu tær sær, at hon fór at útvega teimum grundøki onkunstaðni millum arbeiðsplássini bæði. Meðan bíðað varð eftir svari, fóru fólk at kjakast, sum vera man. Fór tað ikki at vera ein øgiligur klassamunur í hesum barnagarðinum? Also hugsi tykkum, barnið hjá einum lækna ella ”sjúkrapleyirsku” og so tað hjá fiskakonuni! Hesum tvørleikum høvdu vit helst sloppið undan í dag, ald upp sum vit eru, ikki minst í skúlanum, í virðing fyri tí einstaka. Tað sluppu tær eisini, tí kommunan hirði ikki at svara.

**Fiskafólk- góðir búskaparfrøðingar.**
Tað áhugaverda í øllum hesum er, at hesar skilagóðu fiskakonur vóru langt framman fyri sína tíð. Og so langt framman fyri okkara høgt mettu búskaparfrøðingar. Tað prógvar tað øgiliga útgreiningararbeiðið í Hvítubók. Fylgibind 1, Búskapur, hevur undirheitið – ein sjálvberandi Føroyskur búskapur. Men ongastaðni er nøkur lýsing av, hvat krevst á tí sosiala økinum fyri at náa hesum máli. Ikki vinnuliga heldur. Ikki eitt orð, sum sigur nakað um, hvørjar umstøður skulu til, fyri at fólk skulu kunna vera virkin. Tí er tað eitt sindur stuttligt nú aftur og aftur at lesa í bløðunum, at búskaparliga fortreytin er slíkt sum barnaansing, eldrarøkt og skúli. Hetta vistu tær fyri 40 árum síðan, uttan nakra sum helst búskaparfrøði. Vanligt vit og skil man vera tað drúgvasta. Somuleiðis boðskapurin hjá Javnaðarflokkinum- FÓLKIÐ FYRST!

Við vón um, at øll á Landssjúkrahúsinum eins og øll onnur fáa síni børn ansaði við uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum um ansingartrygd, systkinaavsláttur og eitt ára barnsburðarfarloyvi.

# Fullveldi í eygsjón

**Leivur Hansen,**
*løgtingsvalevni tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Víst megna vit væl sjálvi at fíggja eitt betri samfelag uttan studning úr Danmark.

Tað gongur sjón fyri søgn.

Henda samgongan setti sær føroyskt fullveldi og búskaparligt sjálvbjargni sum endamál.

Tjóðveldisflokkurin hevur við hegni og skili umsitið fíggjar- og búskaparmál.

Flokkurin hevur hesi fýra árini lagt dent á at reka ein varnan og ábyrgdarfullan búskaparpolitikk við tí fyri eyga at gera okkum óheft av donskum studningi og raðfesta sosialu trygdina og íløgur í framtíðina hægst.

Og eftir fýra árum við fullveldispolitikki, eru vit so nær sum ongantíð at gerast óheft av donskum pengum.

Ongantíð áður hevur gingið so væl í føroyska búskapinum.

Saman við góðum prísum og lágari rentu á heimsmarknaðinum hava føroyingar framleitt og skapt nýggj virðir, sum hava leitt okkum so nær sum nakrantíð at hava ein sjálvberandi búskap.

Vit brúka nú bert umleið 200 miljónir krónur av donsku heildarveitingini.

Samstundis hava vit spart 2,5 miljardir krónur saman í Landsbankanum.

Og hóast vit hava lagað okkum til ein sjálvberandi búskap og brúkt minni og minni av heildarveitingini, so eru gjørdar størri ábøtur í teimum týdningarmiklu almennu tænastunum enn í nøkrum valskeiði áður:

Almannamál eru hækkað við góðum 300 milj. kr.

Heilsumál eru hækkað við 116 milj. kr.

Mentan, útbúgving og gransking eru hækkað við 180 milj. kr.

Og útbyggingarnar á samferðsluøkinum hoyra so sanniliga heldur ikki heima í smálutadeildini. Hugsið bert um nýggja Smyril, Vágatunnilin, Gásadalsbergholið osfr.

Rætt er, at búskaparvøksturin í Føroyum seinastu árini hevur verið sera høgur (5-11 %).

Onki bendir tó á, at nakað stórt afturstig er á veg, hóast partar av vinnuni hava og kunnu fáa trupulleikar við marknaðarprísunum.

Afturímóti eru útlit til, at økt virksemi fer at koma næstu fýra árini av oljuleiting og møguligari oljuframleiðslu.

Megna vit at halda kós og standa saman um at byggja land, so hava vit allar møguleikar at gera okkum heilt leys av donskum studningi komandi árini.

Løgtingsvalið 30. apríl er eitt avgerandi val fyri framtíðina hjá øllum føroyingum.

Vit kunnu velja at halda frælsiskósina og velja veruliga vælferð.

Ella vit kunnu velja at detta aftur í heimastýris- og studningsmeldurin, sum leiddi okkum út í ófrælsi við ongari vælferð.

Tjóðveldisflokkurin í landsins leiðslu er trygdin fyri, at frælsiskósin verður hildin.

Tjóðveldisflokkurin í landsins leiðslu er somuleiðis trygdin fyri, at búskaparliga skilið verður hildið.